## út at koyra

## Fuji eigur Subaru

Tað er japanska fyritøkan, Fuji Heavy Industries, sum eigur Subaru. Teir samstarva við Suzuki um plattformar og komponentar, eins og teir hava sølusamstarv við Volvo og Porsche.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

## Skoda Fabia

Ein nýggjur Skoda er á veg. Talan er um Skoda Fabia, ið kemur á marknaðin í vár. Seinni í ár kemur hann sum stationvognur.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**



## Chrysler PT Cruiser

Tann nýggi »gamaldags« MPV bilurin hjá Chrysler, PT Cruiser, verður framleiddur á eini verksmiðju hjá Chrysler í Mexico. PT stendur fyri People Transport.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

# Volvo instruktiónsbók komin út á fløgu




MAGNUS GUNNARSSON

Volvo Cars hava brúkt ta nýggjastu menningina innan tøkni til at gera heimsins fyrstu »interaktivu« instruktiónsbókina á fløgu. Higartil hevur tann informatión, sum fylgir við einum nýggjum bili, verið instruktiónsbókin. Men líkamikið, hvussu væl ein instruktiónsbók er gjørd, eru tað fáir bileigarar, sum lesa hana gjølla fyri at læra teirra nýggja bil at kenna. Vanligat er, at tað er, tá ein sikring ella pera skal skiftast, at bókin verður tikin úr handskarúminum.

### Interaktiv fløga

Nýggir bilar fáa støðugt fleiri funktiónir, sum bileigarin skal læra seg at halda skil á. Meðan Volvo V70 hevur staðið í gerð, hevur tekniska deildin hjá Volvo arbeitt við eini fløgu, sum kundin kann granska, meðan hann bíðar eftir bilinum.

Fløgan inniheldur frágreiðingar um allar hugsandi funktiónir í bilinum. Hon er býtt upp í tveir partar, har ein partur er vanligar upplýsingar, meðan hin er »interakti«, har týðuligar myndir vísa allar lutir og skipanir frá ymsum síðum.

### V70 á skerminum

Man kann starta upp við at rotera bilinum á skerminum fyri at síggja hann frá øllum síðum. Um vit klikkja á t. d. bakhurðina, kann dúrkið í viðførisrúminum latast upp og eykasetrið til tvey børn hálast upp.

Meðan gólvið er opið ber til at nýta møguleikan til at læra seg at skifta akkumulator. Klikkja vit á akkumulator, kemur akkumulatorurin upp í einum horni á skerminum. Soleiðis kanst tú blíva við og royna allar møguleikarnar, ið bilurin hevur. Ein stórur partur av fløguni er sjálvandi um trygd, og hvørjar verjuskipanir verða settar í verk við ein samanstoyt.

**Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S**

# Flaggskipið hjá Opel – Omega árgang 2000

MAGNUS GUNNARSSON



Opel Omega, ið er flaggskipið hjá Opel, er nógv broyttur bæði uttan og innan, eins og bilurin er gjørdur út við tí, sum nýggjasta tøknin kann bjóða.

Verkfrøðingarnir hjá Opel hava bøtt koyrieginleikarnar á hesum vælkoyrandi bakhjólstrekta bilinum. Lyklaorðið hjá teimum var, at bilurin skuldi vera ljóðleysur, og dygdin á høgum støði.

Omega hevur fingið ein nýggjan bremsuforsterkara, Quick Power, sum gevur munandu betri bremsukraft. Síðuspeglini hava fingið nýtt design, sum ger, at lítið hoyrist til vind, tá ferðin er nógv. Innan manglar einki, t.d. er fjarstýring í rættinum til radio og aðra kommunikatiónsútgerð.

Omega 2000 fæst sum sedan við fýra hurðum og sum stationvognur við fimm hurðum, eins og fimm bensin- og dieselmotorar eru at velja ímillum.

Bilurin fæst í fýra útgávum: standard útgávan er Comfort, síðan koma Elegance og Sport, meðan tann fínasti er Executive.

**Kelda: Nyt fra Opel**



## út at koyra



*Tað virkar rættuliga ógvusligt, tá teir trýsta á knøttin, og allur bilurin sum hann er verður ristur harðliga fyri at avdúka, um slit er í upphangum og róðurgreiðum*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Til sýn á Bileftirlitinum

MAGNUS GUNNARSSON

Eftir at Skipasýnið hevði virkað sum bileftirlit, varð Bileftirlitið sett á stovn í 1960.

Tá vóru færri enn túsund bilar í Føroyum. Síðan tá er talið av bilum vaksið alsamt, og Bileftirlitið hevur seinnu árini fingið rættuliga góðar umstøður at virka undir.

Bygningurin við Hoyvíksvegin er sera væl egnaður til endamálið, og umsitingin av nummarplátum og koyrikortum var í 1996 flutt frá Fútaskrivstovuni til Bileftirlitið. Hetta árið fingu vit eisini føroyskt koyrikort. Eitt av endamálunum við Bileftirlitinum er, at øll skulu kunna ferðast trygt í ferðsluni.

### Tá bilur verður sýnaður

Sýnsmenn á Bileftirlitinum greiða her frá arbeiðsgongdini, tá ein persónbilur verður sýnaður.

Tá bileigarin kemur til sýnshøllina við bilinum, er tað av týdningi, at koyrt verður fram ímóti garasjuportrunum, so teir vita, um tað nú er tann rætti bilurin, ið er komin.

Tá bilurin er komin innum, verður útsúgvingsútgerðin sett á endan á útstoytinum, og kannað verður, um allar perurnar eru í lagi, og um lyktirnar eru rætt stillaðar.

Síðan verður koyrt inn yvir bremsutestaran, sum vísur, um bilurin bremsar tað hann eigur, ella um hann bremsar skeivt o.a. Eftir tað verða støddoyvarnir kannaðir, eins og eitt tól vísir, um bilurin skal sporast.

Tá bilurin verður koyrdur inn yvir lyftina, verður hugt eftir, hvussu hann sær út uttan og millum hurðarnar. Tá tað er liðugt, verður bilurin lyftur upp so sleppast kann at hyggja at undirvogninum, um bremsurørini eru í ordan, og um berandi lutir eru rustaðir, um oljulekar eru, og um gátturnar eru tærdar o.s.v.

Á lyftini standa forhjólini á eini ristiplátu, og tað virkar rættuliga ógvusligt, tá teir trýsta á knøttin og allur bilurin sum hann er verður ristur harðliga, hetta fyri at avdúkað, um slit er í upphangum og róðurgreiðum.

### Undirvognurin skal vera reinur

Tað, sum Bileftirlitið kannar, er um bilurin lýkur øll trygdarkrøv, ikki feilfinning í bilinum sum heild. Eitt, sum er avgerandi fyri arbeiðsgongdina í sýnshøllini er, at fólk koma til ta ásettu tíðina. 15 minuttir eru settir av til hvønn bilin, so um fólk koma ov seint, verður alt ov lítil tíð til at sýna bilin, sum hann skal, og tað gongur út yvir tann næsta, sum kemur til tíðina og bíðar eftir at sleppa til.

Tá vit fáa boðan um at koma til sýn við bilinum, stendur aftanfyri á fráboðanini, at bilurin skal vera vandaliga reinsaður, so at allir lutir lættliga kunnu kannast. Ein sýnsmaður, sum sýnar ein bil, sum er so skitin, at hann einki sær, kann ikki geva trygd fyri at bilurin er í lagi. Tað er bilførarin, sum hevur ábyrgd av, at bilurin, hann koyrir, er í lagi.

Umframt høvuðsdeildina við Hoyvíksvegin í Havn hevur Bileftirlit Føroya sýnshølir í Skálabotni, í Klaksvík, á Tvøroyri, í Miðvági og á Sandi.

Stjóri á Bileftirlitinum er Jákup Jacobsen.



*Inni í sýnshøllini. Grøvin høgrumegin á myndini er til stór akfør, so sum lastbilar, trailarar og bussar*

**Mynd: Álvur Haraldsen**



*Tá bilurin kemur innum, verður útsúgvingsútgerðin sett á endan á útstoytinum*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

## Bileftirlit Føroya

Bileftirlit Føroya varð stovnað í 1960.

Fyri 1960 stóð Skipasýnið fyri sýnum av bilum.

Í 1960 vóru færri enn 1.000 bilar í Føroyum

Umframt bilasýnið umsitir Bileftirlit Føroya eisini:

- Koyriroyndir
- Koyrikorti
- Nummarplátur

Bileftirlit Føroya húsast, umframt í høvuðsdeildini við Hoyvíksvegin í Havn, í Skálafirði, í Klaksvík, í Tvøroyri, í Miðvági og heima á Sandi

## Ellisakfør aðalfund

Leygardagin komandi hevur Føroya Ellisakfør aðalfund.

Endamálið hjá felagnum er at varðveita gomul akfør og at bøta um umstøðurnar hjá teimum, ið fáast við hetta ítrív. Felagið arbeiðir eisini við at nøra um hendan partin av mentan okkara, eitt nú við at savna saman siðsøguligt tilfar um bilar, ferðslu og um bilstarvsgreinina annars.

Felagið er í løtuni í ferð við at innrætta gamla vatnbrunnin við Gráastein í havn til tøkniligt fornminnissavn.

Tað er Brynjávlur Jensen í Havn, ið hevur verið formaður í felagnum síðani stovnanina í 1992, og sum Sosialurin skilir stillar hann uppaftur á aðalfundinum leygardagin.